KNUD E HANSEN A/S

- Skipsteknisk ráðgevandi fyritøka við umleið 80 starvsfólkum
- Høvuðssæti í Helsingør við smærri deildum í Onglandi, USA, Grikkalandi, Australia og Føroyum.
- Á føroysku deildini starvast Marni Olsen og Thormund Johannesen, sum báðir eru skipsførarar og skipsverkfrøðingar.
- Báðir við drúgvum royndum á sjónum, á skipasmiðju og sum ráðgevandi.

KNUD E. HANSEN
SHIP DESIGN SINCE 1937

STRANDFARASKIPINI Á EINUM “VEGAMÓTI”

1. Hvussu er standurin umborð?
2. Hvørja kós skulu vit seta út í kortið?

HVUSSU ER STANDURIN UMBORÐ?

KNUD E. HANSEN
SHIP DESIGN SINCE 1937

1. Myndugleikakrøv
   - Krøv til verandi gomul skip eru ikki tey somu, sum til tilsvarandi nýggj skip.
   - Skipini lúka sostatt ikki fleiri av nýggjastu krøvunum.
2. Komfortkrøv
   - Komfortkrøv í dagsins samfelag eru ikki tey somu, sum tá ið verandi strandfaraskip blivu smíðað, helvtin av flotanum í 1970'unum.
   - Skipini lúka sostatt ikki dagsins krøv til komfort.
3. Kapasitetskrøv
   - Fólkatal, ferðafólkatal og bilaferðsla vaksa, men strandfaraflotin fylgir ikki við.
   - Lastaevnini á helvtini á flotanum eru minkað niður í 1/3. (Ritan, Sam og Ternan)
4. Viðlíkahald
   - Ellisbrek eru veruliga farin at gera um seg.
   - Tæringar og eykalutir, sum ikki kunnu skaffast og tí mugu framleiðast.

HVØRJAR ERU AVBJÓÐINGARNAR?

KNUD E. HANSEN
SHIP DESIGN SINCE 1937

- Gomul skip
  - Danski handilsfloltin: 55% av tonnaguni yngri enn 10 ár.
  - Danskar ferjur: 25% av tonnaguni yngri enn 10 ár.
  - Strandfaraskipini: 0% av tonnaguni yngri enn 10 ár.
    - Helvtin av flotanum, 3 av 6, (Ritan, Sam og Ternan) eru smíðað í 1970'unum.
  - Komforturin er so hareftir.
- Avloysaraskip
  - Gamal ellisbreksmerktur floti økir um kravið til avloysaraskip, og tað hevur flutt fokus frá veruliga trupulleikanum.
  - Skjóttgangandi avloysaraskip er ikki nøkur loysn, men symptomviðgerð, meðan sjúkan stendur við og bara versnar.
  - Hevur tú gamlan bil, sum ofta er á verkstað og onkrar morgnar ikki startar, so keypir tú tær ikki eina knallert, at hava til at taka, sum avloysara. Nei, tú keypir tær nýggjan bil, sjálvandi.
- Nýggj skip
  - ***Veruliga og einasta loysnin er at endurnýggja flotan.***
    - Og tað kann bara gerast við nýbygging, tí tað er nærum ómøguligt at finna eksisterandi ferjur, sum hóska til føroyskt farvatn og lúka galdandi krøv. Skip, sum Ritan, Sam og Ternan høvdu slett ikki sloppið inn í flotan, um so skuldi verið.

HVØRJA KÓS SKULU VIT HALDA?

1. Suðuroyaleiðin
   - Nýggjasta skipi, ið best lýkur krøvini. Neyvan stórvegis broyting næstu árini, burtursæð frá í ferðaætlan.
2. Sandoyarleiðin
   - Verður avloyst av vegasambandi um nøkur fá ár. Ein tíðaravmarkaður kapasitetstrupulleiki.
3. Kalsoyarleiðin
4. Nólsoyarleiðin
5. Svínoy/fugloyarleiðin
6. Skúgvoyarleiðin
7. Hestleiðin
8. Mykinesleiðin
   - Mykinesleiðin er kanska nakað fyri seg. Verður ikki sigld um veturin og er seinnu árini útveitt.

Tað er tí fyri leiðirnar Kalsoy, Nólsoy, Svínoy/Fugloy, Hest og Skúgvoy at nýggj kós eigur at setast út í kortið.

NÝGGJAR LOYSNIR FYRI HESAR LEIÐIR:

1. Kalsoyarleiðin
   - Ferðafólka- og ro/ro-bilferja til øki C - (57.307 ferðafólk og 7.964 bilar í 2017)
2. Nólsoyarleiðin
   - Ferðafólka- og ro/ro-bilferja til øki C - (101.097 ferðafólk og 5.447 bilar í 2017)
3. Svínoy/fugloyarleiðin
   - Ferðafólkaferja til øki B, sum eisini kann taka einar tveir bilar - (14.563 ferðafólk og 19 bilar í 2017)
4. Skúgvoyarleiðin
   - Ferðafólkaferja til øki B, sum eisini kann taka einar tveir bilar - (5.287 ferðafólk í 2017)
5. Hestleiðin
   - Ferðafólkaferja til øki B, sum eisini kann taka einar tveir bilar - (6.264 ferðafólk og 449 bilar í 2017)

UPPSKOT TIL FRAMTÍÐARFLOTA

KNUD E. HANSEN
SHIP DESIGN SINCE 1937

- 2 bilferjur til øki C
  - Kalsoyarleiðin
  - Nólsoyarleiðin
- 3 ferðafólkaferjur, sum eisini kunnu taka einar 2 bilar, til øki B
  - Svínoy/fugloyarleiðin
  - Hestleiðin
  - Skúgvoyarleiðin
- Tað snýr seg um tvey design
  - 2 systirskip til kalsoyarleiðina og nólsoyarleiðina
  - 3 systirskip til svínoy/fugloyarleiðina, hestleiðina og skúgvoyarleiðina.

2 BILFERJUR TIL ØKI C

- At ferjurnar ikki nýtast at kunna loysa av í øki B, sandoyarleiðini, minkar um krøvini.
- Krøvini eru tí minni enn til ta nólsoyarferjuna, sum bleiv boðin út í 2015.



- Møguleikar eru tí fyri einfaldari designi.


UPPSKOT TIL 2 BILFERJUR

- Opin dupultendari
  - Ferjan nýtist ikki at venda og sparir tí bæði orku og tíð.
  - Stuttar leiðir, hálvurtriði góðar 3 fjórðingar. Ferðin tí ikki so umráðandi. Max. økonomisk ferð í mun til longd á skrokki.
- Ferðafólkarúm í báðum borðum á bildekki
  - Onki trin, ongar trappur og stutt frá bili til salong.
  - 100 fólk á vetri og 150 á sumri, tá ið møguleiki er at fara uppá opið dekk.
- Gjøgnumgangandi bildekk til tvey røð
  - 16 persónbilar
  - 1 bussur og 12 persónbilar
  - 2 bussar og 6 persónbilar
  - 3 bussar
- Diesel elektrisk (hybrid)
  - Tað almenna kann her ganga undan við at minkað útlátið sambært nýggjastu IMO tilráðingini.
  - Í staðin fyri 4 diesel-aggregat kunnu nøkur teirra vera battarípakkar.
  - So hvørt tøknin mennist kunnu battaríeindirnar gerast fleiri, so ferjan at enda verður 100% el-drivin.
  - Til tess krevst, at neyðugar og nøktandi streymveitingar eisini verða gjørdar við ferjulegurnar.

OPIN BILFERJA, DUPULTENDARI

- Einføld loysn til Kalsoy og Nólsoy
- Stutt frá bili til ferðafólkarúm
- Ongar trappur ella trin
- Ferjan nýtist ikki at venda
- Umleið 100/150 ferðafólk
- 16 persónbilar
- 1 bussur og 12 persónbilar
- 2 bussar og 6 persónbilar
- 3 bussar ella onnur tung akfør

- Tvørskurður og deksplánur
- Longd umleið 44 m og breidd umleið 11 m



UPPSKOT TIL 3 FERÐAFÓLKAFERJUR


KNUD E. HANSEN
SHIP DESIGN SINCE 1937

- Ferðafólk
  - Ferðafólkarúm til 80 fólk á vetri og ein 120 á sumri, tá ið eisini kann farast upp á opið dekk.
- Bilar
  - Pláss til ein lítlan oljubil, renovatiónsbil ella rottangatømara.
  - Tá er somuleiðis pláss fyri lítlum bussi ella 2 persónbilum.
- Sigliferð
  - Ein ferja, sum skal kunna taka ein lítlan lastbil ella buss, fæst neyvan at ganga skjótt.
  - Fyri hest- og skúgvoyarleiðinar, góðar 2- og -4 sjómíl, hevur ferðin ikki so stóran týdning, men kanska á svínoy/fugloyarleiðini, sum er 8/10 sjómíl.

  - Kanska kunnu onnur enn MEST í Føroyum bjóða uppá at smíða hesar ferjur.

FERÐAFÓLKAFERJA + 2 BILAR

- Til Svínoy/Fugloy, Hest og Skúgvoy
- Umleið 80/120 ferðafólk
- Ein lítil oljubilur, renovatiónsbilur ella rottangatømari
- 2 persónbilar
- Ferjan minnir um Rituna í støddd, bert eitt sindur breiðari.
- Tvørskurður og deksplánur
- Longd umleið 24 m og breidd umleið 8 m



SAMANUMTIKIÐ

1. Strandfaraskipini er alt ov gomul og sambærlig við ellisakfør.

2. Tað er sera trupult, fyri ikki at siga ómøguligt, at finna nýggjari eksisterandi skip, sum eru egnaði.

3. Ein endurnýggjan við nýbygningum er tí einasta loysn.

4. Eitt avloysaraskip er bara ein symptom-viðgerð, og loysir ikki veruliga trupulleikan.

5. Diesel-el hybrid, sum við tíðini kann víðkast til reina el-drift, eigur eisini at vera eitt mál.

6. 5 (møguliga 6) ferjur í eini langtíðarraðfesting kann vera eitt av amboðunum hjá tí almenna at skapa arbeiði, tá ið tíðirnar aftur gerast verri.

TAÐ ALMENNA KANN SLÁA TRÍGGJAR FLUGUR VIÐ EIN SMEKK

1. Endurnýggja strandfaraskipsflotin

2. Ganga undan við at minkað um CO2-útlátið frá skipum

3. Nýta langtíðarraðfestingina sum konjunkturstýrandi amboð.
   - Skipasmíð aktiverar nógvar ymsar handverksvinnur.
   - Kanska onnur enn MEST í Føroyum kunnu bjóða uppá at smíða minnum ferjurnar.

ALTERNATIV NIÐURSTØÐA

- Knud E Hansen vil sleppa at tekna ferjur, er kanska niðurstøðan, sum onkur ger sær burtur úr hesum.

- Tað kann væl vera, men eg haldi meg hava argumentera fyri, at endurnýggjan við nýbygging er rætta og einasta loysnin.